## HEILSANIR



**Góði Óðin og góða Marin**
Hjartaliga tillukku við føðingardøgunum 19. sept. og 19. okt. Jesus pápi signi tykkum.
**Omma og abbi á Norðurrás**



**Góði Karstin og Djóni**
Hjartaliga tillukku við døguønum. Djóni tann 9. sept. og Karstin tann 20. sept.
**Heilsan babba og mamma**



**Góði tit bæði**
Hjartaliga tillukku við lítlabeiggjanum. Gud signi tykkum,
**Omma og abbi**



**Góði Sonni**
Hjartaliga tillukku á 15 ára degnum 18. sept. Jesus signi framtíð tína.
**Heilsan mamma, babba, Súni, Ása og Mary**



**Til Edith Kristinu og Jóhann Sofus**
Lukku og gleði á tykkara 2 og 4 ára degi. Jesus pápi signi tykkum.
**Bestu heilsanir Karla-omma**



**Til Edith Kristinu og Jóhann Sofus**
Hjartaliga tillukku á 2 og 4 ára døgunum 15. og 22. sept. Muss og klemm.
**Heilsan gubbi og mammubeiggi**

i
Sosialurin

## VIÐMERKINGAR

# Sjúkrahús við nátthúsum

**Heri Mohr**



Í SKÁANUM nr. 172 og 173 svarar cand.theol. Tórður Jóansson upp á nakrar spurningar, sum vórðu settir honum í SOSIALINUM nr. 131.

Fyrst at siga, at hetta at geva fólki svar, tá ið spurt verður, er góður siður, og tað var tessvegna ongantíð ivi um, at Tórður fór at geva skilagott svar, og tað gjørdi
hann so eisini bæði væl og virðiliga. Fyri hetta hevur hann uppiborið stóra tøkk, og hana fær hann við hesum.

Hann, ið hetta skrivar, hevur í nøkur ár, áðrenn verandi landsstýrið kom, skrivað nógv lesarabrøv um samfelagsspurningar, spurningar sum hava relatión til sosiala tryggleikan í Føroyum og so statt viðkoma hvørjum mansbarni. Hesi brøv høvdu beinleiðis ella óbeinleiðis adressu til tá førda politikkin, men nei, tað var sum at sláa í eina dýnu. Tøgn sum í grøvini.

Av teimum 7 deyðssyndunum er tann fyrsta: Hugmóð. Í framkomnum londum, har demokratiið ræður, fara hugmóðiligir politikarar og teirra ráðgevar í myrkrið og gloymskuna. Øðrvísi í Føroyum!

Viðvíkjandi orðunum feria og frí, so má tað haldast, at ein persónur, sum hevur fingið frí (day off), er ikki farin í feriu, og at sami persónur, sum hevur fingið feriu (holiday) avspákar ikki frídagar.

Frí og feria merkja, hví ein persónur ikki er til arbeiðis.

Og so er tað varmin, sum ongan góðan eigur. Alt broytist, eisini veðurlagið, men valla finst nakar turistur, sum kann siga seg hava vitjað Føroyar í tropiskum hita, sjálvt um ÚF og SvF hvønn dag fráboða, hvussu hitin er í Føroyum. Um okkara leiðir er tað varmi ella kuldi, sum er í luftini. Vit siga tó onkuntíð, at her er heitt, sum í h……; og enn er tað loyvt at biðja børnini koma inn í varman og verma seg, ella, far undir dýnuna við varmadunki, tað plagar at hjálpa. Ì Bretlandi og á tí europeiska meginlandinum skilja tey ímillum hita og varma, og tað gjørdu vit eisini til einaferð miðskeiðis í farnu øld, t.v.s. fyri hálvtrýss árum síðani, men so tók tann fjákuta undirlutakenslan mótvegis tí danska málinum rættiliga dik á seg, samstundis sum skilafólk arbeiddu við at tillaga tað føroyska málið til nútíðina. Hetta villist í stirvnari, fortíðar orðadyrkan og bábyloniskum fløkjum. Nógvir føroyingar, eisini løgtingsmenn, hava trupulleikar við at skilja føroyskt og tessvegna ilt við at málbera seg í skrift og talu.

Vandamálið verður ikki loyst, fyrr enn tann føroyski skúlin aftur fer at læra børnini tað latínska alfabetið, tillagað tað føroysku tunguna - og fremmanda orð, sum koma inn á okkum, serliga úr Bretlandi og øðrum størri londum á meginlandinum. Landsstýrismaðurin við menta- og skúlamálum eigur skjótast at lýsa fylgjandi bókstavar sum partar av tí føroyska alfabetinum: c, w, x og z. Ikki fyrr enn tað er gjørt, kunnu vit aftur fara at læra okkara børn ABC´ið og stava orð rætt.

Vit føroyingar hava nógv lániorð úr Bretlandi (Skotlandi) - hugsa bara um øll orðini, sum komu við sluppunum fyri meira enn 100 árum síðani. So hví ikki »lána« og brúka orðið nurse (nørs) í staðin fyri sjúkrasystur, sum Tórður mælir til? Mær vitandi eitur ein yvirsjúkrasystur sister í Bretlandi, so vit liggja nær UK í hesum spurningi. Men áðrenn starvsheitið sjúkrasystur skal fara í søguna, eigur orsøk og niðurstøða at verða lagt fyri sjúkrasystrafelagið til ummælis.

Ordnung muss sein!.

Fyrst í h. mð. skrivaði DIMMALÆTTING eitt sindur um tann nýggja sjúkrahúsbygningin, sum Landssjúkrahúsið fer at taka í nýtslu um stutta tíð. Blaðið skrivaði, at har er alt so vakurt og væl gjørt, at »tað er sum at koma í annan heim«. Greitt verður frá, hvussu framkomið alt fer at verða, tá ið innbúgv, tól o.a. er komið, og liðugt og klárt er at taka ímóti sjúklingum. Eftir øllum at døma fer sjúkrahúsið tá at liggja javnt við ella kanska eina lítla bátslongd framman fyri tey, sum vit vanliga plaga at sammeta okkum við.

Fer tað nú tað?

Í greinini lesa vit eisini, at »millum hvørja stovu er eisini eitt baðirúm og nátthús. Hurð er til báðar síður…«

Nátthús!! Hvussu skal tað skiljast:

- Hevur sjúkrahúsið fingið nátthús og bukku millum hvørja stovu, til tess at okkara langommur og langabbar, um tey fara at spøkja har um leið, ikki skulu ivast í, hvar tey kunnu loysa sær buksurnar, tí tey høvdu nátthús og bukku, meðan tey vóru á foldum, men slíkt er farið í søguna fyri langt síðani.

Gamla sjúkrahúsið (1925) hevði valla nakað nátthús.

- Ella er tað so galið, at WC og Toilett eru/verða bannlýst orð á okkara sjúkrahúsum ?

Um tað er satt, tað sum blaðið hevur skrivað um nátthús á tí nýggja sjúkrahúsinum, so eigur landsstýrismaðurin við heilsumálum at steðga ørskapinum beinanvegin.



